# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Tað er við blandaðum kenslum, at eg fari suður at spæla dyst.*

*Maria Steinkross, SÍ-leikari*

## – Vit mugu vinna heima-dystirnar

**Hetta sigur Áki G. Olsen hjá VÍF, sum helst enn einaferð má vera Inga Olsen og Agnar Joensen fyri uttan. Hnvegin hevur Neistin allar sínar mans tøkar til dystin.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF hevur fingið góða byrjan uppá kappingarárið. Teir hava fingið trý av fýra stigum og eru á odda í bestu mansdeildini saman við StÍF.

Neistin hevur eisini fingið hampuliga byrjan. Teir hava tvey stig av fýra møguligum, og seinast vunnu teir tryggan sigur í Kollafirði.

Áki G. Olsen hjá VÍF sigur, at teir eru heilt væl nøgdir við gongdina inn til víðari í kappingini.

– Vit hava vunnið á meistarunum og fingu javnt á Skála ímóti einum liði, sum vit vanliga hava tað ringt ímóti. So eg haldi, at gongdin hevur verið góð. Nú spæla vit ímóti einum neistaliði við nógvum nýggjum leikarum, men vit skulu sjálvsagt vinna okkara heimadystir.

Dann Thorleifsson hjá Neistanum sigur, at teir eisini ætla sær sigurin í Vestmanna.

– Ja, sjálvandi ætla vit at vinna. Eg haldi liðið hjá okkum vera so mikið gott, at um vit hava ein góðan dag, so kunnu vit vinna á øllum. Vit vunnu eisini trygt í Kollafirði seinast, og hesa gongdina ætla vit at halda fast um.

# Stjørnan og Neistin bresta saman

**Alina Olaru er ivasom hjá Stjørnuni til spennandi dystin ímóti Neistanum sunnudagin. Hjá Neistanum verður Unn Kragesten ikki við vegna skaða, meðan nýggi leikarin, Katja Eigemann, skal leika sín fyrsta dyst á neistaliðnum.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Stjørnan og Neistin stríddust um meistaraheitið í fjør. Nú verður spennandi at síggja, hvat av hesum liðunum fer at roynast betri í teirra fyrsta dysti í ár.*

Tveir dystir vera á skránni í Sunset deildini í vikuskiftinum. Mesti spenningurin verður helst í Klaksvík, har Stjørnan tekur ímóti Neistanum. Hesi bæði liðini stríddust um gullið í fjør, og tí verður bíða við spenningi til dystin fyri at síggja, hvat av liðunum tykist sterkari í ár.

### Alina og Unn ivasamar

Ein av bestu leikarunum í hjá kvinnum seinnu árini hevur verið rumenin, Alina Olaru. Hon hevur drigist við ein skaða í vikuna, og enn er ógreitt um hon verður tøk til dystin ímóti Neistanum. Venjarin hjá Stjørnuni, Henrik Gerster sigur, at tær sjálvandi ætla at vinna dystin.

– Vit fara út á vøllin fyri at vinna hvønn dyst. Neistin er kanska okkara størsti kappingarneyti í ár, men vit ætla ikki at bakka av teirri grund. Vit mugu tó eisini royna at fáa betri glið á okkara spæl, tí hetta hevur stóran týdning í eini so langari kapping.

Neistin má eisini vera uttan ein av sínum stuðulsleikarum. Unn Kragesten er ikki við vegna skaða. Ása Dam á Neystabø hjá Neistanum sigur, at hetta verður ein trupul dystur ímóti einum royndum stjørnuliði.

– Dystirnir í Klaksvík eru altíð harðir, tí Stjørnan er eitt sera gott heimalið. Tær hava nógvar royndir, og hesar fara møguliga at koma teimum til góðar ímóti okkum. Sjálvt um vit hava eitt ungt lið, so ætla vit til Klaksvíkar eftir tveimum stigum.

### VB stórur favorittur

Ein annar dystur er eisini á skránni í bestu kvinnudeildini í vikuskiftinum. Her tekur VB ímóti StÍF í Vági. VB hevur vunnið sín einasta dyst í ár, meðan StÍF enn einki stig hevur fingið.

Í hesum dystinum mugu kvinnurnar úr Vági metast at vera stórir favorittar. Tær eru eitt sera gott heimalið, og so hava tær Daivu Tuomaite, sum seinasta árini hevur verið heilt stóri leikarin í føroyskum kvinnuhondbólti.

Sjálvt um VB er stórur favorittur, so hava strandakvinnur heilt sikkurt ein møguleika. Seinasta dyst mundi StÍF tikið Stjørnuna á bóli síðsta dyst, og kanska tær klára at gera ein vørr í Vági.

# KÍF skal uppá stigatalvuna

**Broytingar eru í væntu í dystinum í Kollafirði, har bæði KÍF og Kyndil ætla sær bæði stigini. Lars Blak verður aftur at síggja í Kyndlamálinum, meðan Rógvi Weyhe og brøðurnir Gert og Arnbjørn Hansen nú eru tøkir hjá KÍF.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

KÍF hevur fingið eina sera ringa byrjan uppá kappingarárið. Teir hava tapt stórt í báðum teimum fyrstu dystunum, men nú ætla kollfirðingar at venda ringu gongdini.

Hjá Kyndli sær heldur betri út. Teir hava fingið tvey stig, og síðsta dyst vunnu teir tryggan sigur á H71. Harafturat verður málverjin, Lars Blak, aftur at síggja ímillum stengurnar, og hetta er stórur styrkur hjá Kyndli.

### Rógvi og brøðurnir Hansen til dystin fús

Sjálvt um kollfirðingar hava fingið eina ringa byrjan, so síggja teir ljóst uppá komandi dystirnar. Rógvi Weyhe er komin heimaftur úr Danmark, meðan brøðurnir Gert og Arnbjørn Hansen eisini vera at síggja á KÍF-liðnum sunnudagin. Hinvegin verður Mirko Milinkovic ikki við sunnudagin.

Karl Johan Djurhuus hjá KÍF er glaður fyri, at nýggju leikararnir eru komnir afturat hópinum, og hann vónar, at KÍF fer at fáa glið á spælið ímóti Kyndli.

– Vit eru keddir um at missa Mirco til dystin, tí hann er ein sera góður leikari. Hinvegin vera bæði Rógvi, Gert og Arnbjørn við aftur, og hetta breiðkar nógv um hópin. Vit fáa nógv fleiri streingir at spæla á, og eg vóni, at hetta fer at geva Kyndli trupulleikar.

Hjá Kyndli er Lars Blak aftur tøkur, og hetta er stórur styrkur fyri teir. Hjalti M. Jacobsen hjá Kyndli sigur, at teir heilt víst ætla sær eftir báðum stigunum.

– Vit fingu eina keðiliga byrjan, tá vit taptu í Vestmanna. Men eftir hetta eru vit komnir betri við. KÍF hevur fingið onkran leikarar afturat hópinum nú, men vit ætla undir øllum umstøðum at fáa bæði stigini við aftur til Havnar.